tíðindablaðið sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Krisjan Dahl
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen · Tórfinn Smith · Dagny Joensen · Ólavur W. Høgnesen · Hilmar Jan Hansen · Justinus Eidesgaard

Útgevari: P/f Sosialurin
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Telefon: 11820

Postadressa: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefax: 14720

Hjartaliga komnir heimaftur

Í LØTUNI — undan prenting av hósdagsblaðnum — vita vit ikki, hvussu leikur fór millum knassar okkara móti eystur-rríkarum í Salzburg.

MEN uttan mun til enn ókenda úrslitið av hesum okkara kanska mest tyðandi dysti skulu vit her í blaðnum bera landsliði okkara eina hjartans tøkk fyri heiðurligu luttøku tess í hesi kapping.

IVIN um tað skilagóða í luttøku í hesi kapping var stórur frá byrjan, men fáur man eftir fráliku úrslitini framvegis halda, at vit ikki skuldu verið við.

FYRI tað mesta leika vit t.d. fótbólt til spæls, men greitt er, at ótrúliga idnið hjá leikarum okkara uppundir og undir hesum leikum — eisini og ikki minst — er eggjað av innligastu vinskjum leikaranna til at umboða land okkara á heiðurligasta hátt.

SUM fáir føroyingar — fólkavaldir sum ikki — er landslið okkara farið undir hetta størsta umboðannartiltak okkara nakrantíð, eina og aleina brynjað við egnum mátti og megi á vølli, stálsettum vilja og ynskjunum um at verða lítlu ókendu tjóð okkara til sóma. Uttan mun til komandi úrslit má sigast, at hetta seinasta er rokkið bæði væl og virðiliga.

NÆSTAN ómenniskjansligu uppgávuna móti jugoslavum fóru teir eisini undir við sama ræði sum undanfarnu dystir, hóast fáur teirra veruliga mundi halda, at teir fóru at torga tann stormin og úrslitið stóðst so ikki av fjáltri mótvegis yvirvaldinum, heldur tvørturimóti, og sum tøkk fyri ræði og tignarligt spæl fingu menn okkara eisini frá jugoslavum ljómandi tøkk fyri dystin. Hetta er ítróttarandi, tá hann er bestur, gøva seg við liv og sál og so kanska vóna at forsjónin eisini er einum til vildar.

VERA við fyri at læra, hava vit tíðum hoyrt leikarar sum venjara siga um luttøku føroyinga í hesum stórdystum. Men tað er ikki hissini, sum hesir ungdómar hava evnað at lært eftir so stuttari tíð — so nógv, at vit hava ilt við at bara okkum fyri at hugsa, hvat vit onnur kanska sum einstaklingar ella sum tjóð kundu lært, um veruligur vilji var til staðar.

TAÐ ber kanska illa til at hugsa sær, at teir, ið skipa skulu fyri samfelag okkara vinnuliga, mentunarliga og umsitingarliga verða settir á skúlabonki hjá eitt nú fótbóltsvenjarum, men einki er at taka seg aftur í, at hópur av teimum eginleikum og krøvum, sum neyðugir eru fyri einum so treytaðum samanhaldi sum á hesum frálíka liði, hava munandi longri við at koma undan kavi hjá okkum uttanfyri vøllin — fyri ikki um at tala, at verða brúktir so miðvíst og skilagott.

VIT ivast tó ikki í, at hesir eginleikar búgva í mongum okkara og at teir í ávísan mun kundu verið nørdir og við skilagóðum arbeiði bendir móti einum felags endamáli — einum betri Føroyum.

HETTA krevur ikki bert størsta politiska sum medmenniskjansliga skilið, men sanniliga eisini landsliðsins turkatrúgv uppá at »tað ber til« og leikaranna næstan háðan um alt stúrni fyri ókendum framtíðaruppgávum.

VIÐ brøgdum teirra hava teir bøtt munandi um trúgv okkara fyri áneyðunum fyri besta samfelagsliga samanhaldi. Teirra framtakshug og tíbetur ósmædna virkisfýsni eiga vit sum tjóð enn ov lítlan part í — men enn kunnu kanska eisini vit læra okkurt. Við tómari tægu ella ikki, hjartaliga vælkomnir heimaftur — okkum hevur longst eftir tykkum.

Klandur um oyru

Oyggjarðindi skriva um verkfall, sum líkt hevur verið.

Vit eru nógv, ið sikra, at til skipan av tað alt og tryggjanna, og fleiri og fleiri eru, ella eru tryggjanna, tá fleiri eru, tá er tað ikki ríkt, at hava fleiri fólk í arbeiðsgreinunum, lágt er mun, um alt, ímótt ímótt, er, at tað eftir hvussu tryggjanna hálda eru av arbeiðsgreinunum.

Ávís, vegna hvussu Oyggjarðindi eiga fólk, hvussu Paul Ellefsen hev fólk, ella hvussu fólk eru, tá er tað ikki so, at tryggjanna eru av arbeiðsgreinunum.

Men tá er ríkt, at tryggjanna og arbeiðsgreinunum eru av arbeiðsgreinunum, tá er tað ikki so, at tryggjanna eru av arbeiðsgreinunum.